# Alt er forkunnugt og spennandi



*Higartil hevur Andrias bert umboðað barndómsfelagið, LÍF. Nú er talan um Víking, og eins og liðfelagarnir er evnaríki leirvíkingurin spentur til stóru avbjóðingina*

**Leikarnir í Víkingi gleða seg av sonnum at tørna út fyri nýggja, samanlagda felagið. Fyri evnaríka Andrias Lava Olsen verður hetta fyrsta kappingarárið í ovastu deildini**

Tvey gjørdust eitt undir nýggjum navni í Eysturoynni. LÍF-andin og GÍ-andin eru smeltaðir saman til ein nýggjan felagsanda. Søgan hjá Gøtu-Tróndi, og víkingaútgrevstirnir í Leirvík hava gjørt sítt til, at navnið á nýggja felagnum er upplagt. 19 uppskot kom inn, og eingin ivi var millum fólk, at "Víkingur" skuldi verða navnið. 30 uppskot komu inn til búmerkið, so áhugin fyri felagnum er stórur. Alt gult og grønt er rullað saman, og nú er tað sum í sanginum hjá Jákup Marner Anthoniussen: "Blátt til allar vinir".

5-6 leirvíkingar verða við til at mynda 1. liðshópin hjá Víkingi, ein av hesum er U-21 landsliðsleikarin Andrias á Lava Olsen, sum hevur leikt á besta liðnum hjá LÍF í 4 ár, øll í næstbestu deildini. LÍF hevur fylt nógv í uppvøkstrinum hjá Andriasi, pápin og 4 pápabeiggjar leiktu við besta liðnum hjá LÍF, og er tí ikki løgið, at beinini hava verið væl plantað í barndómsfelagnum. Fyrsta dystin á besta liðnum fekk hann tá hann var 16 ár. Men nú býðst høvið at leika í Formuladeildini og hava heimbygdina við sær.

**Nógv seriøsari**

- Hetta er nógv seriøsari, enn eg eri vanur við frá 1. deild. Her verður ikki rúm fyri at slaka av. Onkrar royndir á U-21 landsliðnum hevur verið tað mest intensa, sum Andrias hevur verið við til at uppliva. Men nú er tað intensitetur fleri kvøld um vikuna.

- Tað er stuttligt at verða partur av einum liði, sum hevur møguleika at verða heilt har frammi, har tað er stuttligt at verða. Vit stríðast allir á jøvnum føti fyri einum plássi á liðnum, eingin gøtumaður ella leirvíkingur eigur framíhjárætt.

Tað var eitt sindur skakandi fyri nýggja felagið, at brasilski Dido mátti stinga í sekkjin, vegna væntandi, góðkenda venjaraútbúgving.

- Eg helt, sum nógv onnur her á leiðini, at tað mátti koma ein venjari uttani frá, sum hvørki var leirvíkingur ella gøtumaður. Men aftaná, at Dido er farin má eg siga, at Anthon Skoradal ikki hevur gjørt tað verri, sum venjari. Hann hevur heldur gjørt tað betur, um nakað.

Hópurin er 18 mans, og málsetningurin hjá liðnum er at verða millum trý tey fremstu liðini í Formuladeildini. Liðið er mannað við nógvum ungum og evnaríkum leikarum, og serliga trongt er um plássini á miðjuni, har Andrias eftir ætlan skal leika á høgra vongi.

**Kunnu venja eftir ættini**

At hava atgongd til vøllirnar í bæði Gøtu og Leirvík kann hava sínar fyrimunir. Er ættin ring í Gøtu ber til at fara til Leirvíkar at venja, og er ættin ring í Leirvík ber til at venja í Gøtu. Annars hava venjingarnar higartil verið í Gøtu.

- Alt er forkunnugt og spennandi, og vit leikarar gleða okkum til rammurnar rundan um vøllin verða lidnar. Enn eru leirvíkingar ikki byrjaðir at mynda fjepparafelagið "Ultras", men Andrias er ivaleysur í, at leirvíkingar fara at møta í stórum tali til dystir felagsins í Formuladeldini.

Andrias fegnast eisini um, at samanleggingin fevnir um øll lið felagsins.

- Eg hevði ikki vilja verið við, um ikki samanleggingin ikki umfataði øll liðini. Skal Víkingur kunnu kappast við NSÍ, KÍ, B36 og HB í teimum yngri deildunum, so er tað týdningarmikið, at ein hevur góðar árgangir allan vegin. Og ikki bara tríggir ella fýra, sum nú.

**Royndarvant**

Andrias hevur verið uttanlands og vant nakrar ferðir. Higartil hevur talan verið um spennandi upplivingar, men eingin sáttmáli er spurdur burtur úr uttanlandsferðum. Men nú Andrias er partur av einum Formulahópi venur og leikar hann í einum hægri tempo, og tí skuldu møguleikarnir at fingið sáttmála ikki verið verri nú. Men fyri fyrst ætlar Andrias at gera sítt til, at fyrsta kappingarárið hjá Víkingi verður minniligt.

----------------------------------------

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

## Metingin

**Samanleggingar kunnu virka bæði positivt og negativt. Men er undirtøkan, sum Víkingur havt fyrstu mánaðirnar, umboðandi fyri stuðlinum, sum felagið fær, eigur potentialið avgjørt at røkka til eina støðuga plasering í ovaru hálvu. Samanleggingin gevur hartil eitt lið, sum er væl styrkt, ið mun til GÍ-liðið í fjør, og tí er ovara hálva avgjørt eitt realistiskt mál í ár.**

XEROX
formula.fo